ÁRSFRÁGREIÐING 2019-2020

Aðalfundurin 01.04.2020, sum varð útsettur til 10.06.2020

SÁTTMÁLI SAMEINDU TJÓÐA UM RÆTTINDI HJÁ EINSTAKLINGUM, IÐ BERA BREK

MEGD arbeiðir miðvíst við at minna á niðurstøðurnar úr ST og fyri at ávirka almenna myndugleikan at arbeiða við at gera neyðugar broytingar fyri at tryggja, at arbeitt verður út frá sáttmálanum.

www.megd.fo

Innihald

1 Virksemið hjá MEGD 2019-2020 2
1.1 Starvsnevndin 2
1.2 Skrivstovan 2
1.2.1 Fylgjarakort 3
1.3 Forkvinnan upp í tíð 3
1.4 Fíggjarviðurskiftir 3
1.5 Loyvi frá Dátueftirlitinum 4
1.6 Avhending av skjølum 4
1.7 MEGD blað um endumenning 4
1.8 Altjóða dagur teirra, ið bera brek 5
1.9 Ráðstevna um etikk í heilsurøkt í smásamfeløgum 5
2 ST- sáttmálin 5
2.1 Hagtøl og lýsing av brekøkinum 7
2.2 Vitjan í Leirvíkar skúla og Vágs skúla 8
3 Formansfundir 8
4 Lógararbeiði 9
4.1 Skeið um avleiðingar av lógaruppskotum, Stjórnarskúlin 9
5 Rættindi og luttøka 9
5.1 Teknmáls- og skrivtulkatænastan 9
5.2 Bústaðarviðurskiftir 9
5.3 Miðnámsútbúgving, serligt skipað miðnám 10
5.4 Norðurlendsk ráðstevna brek og víðari lestur 10
5.5 Atkoma 10
5.5.1 Bussarnir atkomuligir 10
5.5.2 Luttøka á arbeiðsmarknaðinum 10
5.6 Verja og rætt at atkvøða 12
5.7 Verkfall 12
5.8 Fyritíðarpensjón og gjald fyri heimahjálp 12
5.9 Trygging 13
5.10 Framtíðarfullmakt 13
6 Ymiskt 13

1 Virksemið hjá MEGD 2019-2020

1.1 Starvsnevndin

Í starvsnevndini hjá MEGD sita teir av aðalfundinum valdu limir: Forkvinnan og 4 limir.

Starvsnevndarlimir verða valdir fyri tvey ár ísenn, og kunnu verða afturvaldir eina ferð.

Forkvinnan/maðurin verður vald/ur fyri trý ár í senn, og kann veljast aftur.

Starvsnevndin skipar seg á fyrsta fundi eftir ársaðalfundin við næstformanni.

Øll viðkomandi mál verða viðgjørd í starvsnevndini, og hevur starvsnevndin ein fund um mánaðin, tó undantikið í juli.

Tey, ið hava mannað starvsnevndina síðan aðalfundin í 2019, eru:

Tóra við Keldu, forkvinna

Róa Midjord, næstforkvinna

Hallur Thomsen

Randfríð Sørensen

Anna Petersen

Fía Petersen, tiltakslimur

Durid Johannesen, tiltakslimur

1.2 Skrivstovan

Tóra við Keldu hevur verið forkvinna í MEGD síðan seinasta aðalfund. Hon er at hitta á skrivstovuni mikudag og síðan august mánað 2019 eisini hósdag.

Á skrivstovuni starvast Jónvør Christiansen, sum er aðalskrivari. Ása Dánjalsdóttir, skrivstovufólk fór í annað starv 1. november, og 1. desember byrjaði Steindóra á Stongunum sum skrivstovufólk. Gullbjørg Rasmussen er reingerðarfólk.

Virksemið á skrivstovuni snýr seg um umsiting av parkerings- og fylgjarakortum, móttøku av viðskiftafólki, telefonsamskifti, ráðgeving til limafeløg, almennar myndugleikar og privatpersónar.

Fólk venda sær til MEGD við ymiskum fyrispurningum. MEGD tekur sær so vítt møguligt ikki av einstaklingamálum uttan so, at tað hevur serligan almennan áhuga. MEGD er av tí áskoðan, at limafeløgini eru betur før fyri at loysa einstaklingamál.

Skrivstovan ger hagtøl yvir, hvussu nógv venda sær til felagið um árið. Talan er mest um føroyingar og áheitanir koma harafturat frá útlendingum.

Heimasíðan
MEGD hevur eina virkna heimasíðu, sum er umráðandi sum samskifti úteftir. MEGD hevur eisini eina virkna síðu á Facebook.

Húsið
Fleiri av limafeløgunum nýta hølini í MEGD, somuleiðis er møguligt hjá øðrum at leiga hølini. Feløgini, sum hava skrivstovu í MEGD húsunum, eru: Sinnisbati, Gikta- , Diabetes-, Heila-, Parkinson-, Epilepsi-, Autismu-, Hjarta-, Psoriasis-,og Alzheimerfelagið. Frá 1. januar 2020 leigar ADHD felagið hølir saman við Alzheimerfelagnum.

MEGD húsið hevur fingið fleiri ábøtur.

Ljóðviðurskiftini eru vorðin betri. Ecophon er lagt undir loftini í ovaru hæddini, og eru ljóðviðurskiftini batnaði munandi, soleiðis at ekkóið ikki órógvar.

MEGD hevur fingið nýtt stell við MEGD búmerkinum á.

Gongin í kjallaranum er málað.

Skermur bleiv keyptur til stovuna ístaðin fyri uppvørpuna, sum var við at syngja uppá síðsta vers.

Arbeitt verður við at betra hoyriviðurskiftini í stovuni. MEGD hevur fingið tilboð frá Ljóðtøkni.

1.2.1 Fylgjarakort
Síðan skipanin varð sett í verk, hava uml. 425 fólk, ið bera brek, fingið fylgjarakort. Í 2019 vóru avtalurnar um fylgjaraskipan millum MEGD, Atlantic Airways og Smyril Line endurnýggjaðar. Avtalan við Føroya Kommunufelag varð endurnýggjað í 2018.

1.3 Forkvinnan upp í tíð
Á aðalfundinum 2019 varð uppskot um, at forkvinnan skal upp í fulla tíð, fyri at vera meira tøk á MEGD fyri limafeløgini. Avgjørt varð, at starvsnevndin arbeiddi víðari við uppskotinum og niðurstøðan var, at forkvinnan fór frá at vera ein dag til tveir dagar um vikuna á MEGD. Verkætlanin hevur verið frá august 2019 til apríl 2020. Verkætlanin er javnan eftirmett í Starvsnevndini, har niðurstøðan er, at betri tíð hevur verið at arbeitt við málum, sum MEGD arbeiðir við. Framburðseyðkennini verða, at almenni myndugleikin fremur ST sáttmálan í verki. Sigast kann, at betri stundir hava verið til fundir við politiska myndugleikan og ábyrgdarpersónar á økinum. MEGD ynskir at síggja ítøkilig úrslit, og at ST sáttmálin verður innlimaður í føroyska lóggávu.

1.4 Fíggjarviðurskiftir
Stuðulin yvir fíggjarlógina fyri 2019 var 1,65 mill. Við støði í lóg um ítróttavedding fær MEGD tillutað 5% av veddingarpengunum. Upphæddin fyri 2019 var 920.000 kr. Vit hava ikki fingið at vita enn, hvussu stór upphæddin fyri 2020 verður. Veddingarpeningur kemur bæði MEGD og limafeløgunum til góðar.

Býtislykilin

Sambært viðtøkunum hjá MEGD, skal aðalfundurin taka støðu til býtið av fíggjarliga stuðlinum til limafeløgini, eftir at raksturin hjá MEGD er frádrigin. Aðalfundurin 2019 samtykti uppskotið frá Starvsnevndini at minka um inngjaldið til Limagrunnin og gjalda tilsvarandi meira út beinleiðis til limafeløgini.

Aðalfundurin skal eisini taka støðu til, hvør upphædd skal fara í Verkætlanargrunnin.

Uppskot til nýggjan býtislykil verður lagt fram á aðalfundinum.

1.5 Loyvi frá Dátueftirlitinum

MEGD umsitur umsóknir til parkerings- og fylgjarakort, sum inniber viðgerð av viðkvomum persónsupplýsingum. MEGD søkti í september 2019 Dátueftirlitið um loyvi til at viðgera viðkvæmar upplýsingar. MEGD hevur gjørt tær broytingar, sum lógin um viðgerð av persónsupplýsingum krevur, og hevur fingið loyvi frá Dátueftirlitinum dagfest 22. oktober 2019 við heimild í §39, í løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001, sum broytt við løgtingslóg nr 24 frá 17. mai 2004, sbrt. § 35, stk. 1 at viðgera viðkvæmar upplýsingar í sambandi við parkerings- og fylgjarakort.

1.6 Avhending av skjølum

MEGD varð boðið til undirvísing og kunning á Landsskjalasavninum í reglum um vraking av ávísum savnindum hjá almennum stovnum. MEGD er umfatað av løgtingslóg nr. 49 frá 28. apríl 1992 um Føroya Landsskjalasavn, har tað stendur: § 5. Heitið almennur stovnur, hereftir nevndur stovnur, fevnir um løgting og landsstýri og stovnar teirra, kommunur og felagskommunur og kommunalar eins og felagskommunalar stovnar, stovnar við lógarásettum einkarrætti, sjálvsognarstovnar og privatar <u>stovnar, sum heilt ella fyri meginpartin verða riknir fyri almennan pening, ella sum røkja uppgávur vegna tað almenna.</u>

Sambært Føroya landsskjalasavn §77 og kunngerð 117 frá 5. juli 1995 um almenn savnindi og virksemið hjá Føroya Landsskjalastovni §§70-72 hevur MEGD samskift við Landsskjalasavnið um avhending av skjølum. MEGD hevur avhendað skjøl hjá MBF frá 1981-2005.

Harumframt hevur MEGD søkt um loyvi at avhenda Nema journal í 2025, tá skipanin er 10 ára gomul, og ikki longu í 2020, sum annars er ásett fyri talgilda avhending. Umbønin varð gingin á møti.

1.7 MEGD blað um endumenning

MEGD blaðið kom út altjóða brekdag 3. desember 2019, og snúði seg um endurmenning (rehabilitering). Endamálið við endurmenning er at beina fyri forðingum, sum kunnu forða fyri, at fólk til fulnar og virkin kunnu vera við í samfelagnum á jøvnum føti við onnur. Í samgonguskjalinum 2019-2023 stendur, at *Rehabiliteringin skal styrkjast kring alt landið. Ein yvirskipað lóg skal gerast, sum tryggjar, at ein ætlan verður gjørd fyri hvønn einstakan, bæði viðvíkjandi likamligum, sálarligum og sosialum tørvi*. MEGD ynskti tí at varpa ljós á støðuna viðvíkjandi endurmenning í dag. Í blaðnum eru áhugaverdar samrøður við fólk, sum hava fingið endurvenjing, við leiðarar og fakfólk, Kommunufelagið og landsstýrisfólkini í almannamálum og heilsumálum.

Blaðið fæst við at venda sær til skrivstovuna.

1.8 Altjóða dagur teirra, ið bera brek

Dagurin varð hátíðarhildin í Smæruni 3. des. 2019 í Havn, har Heini í Skorini helt fyrilesturin „Ímillum vinir og fíggindar - Føroyar, ST og altjóða lóg."

Hervør Lützen og Katrin Dagbjartsdóttir søgdu frá teirra royndum við endurmenning og uppskot til, hvat kann gerast betri.

Síðan var pallborðskjak um rehabilitering, habilitering, endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing. Í panelinum vóru Kaj Leo Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttir, landsstýriskvinna í almannamálum, Eyðun Christiansen, stjóri í Kommunufelagnum, Hallur Thomsen, depilsstjóri í Almannaverkinum, Marjun Poulsen, fysioterapeutur og master í heilsuvísindum og Katrin Dagbjartsdóttir.

Nógv fólk møttu til tiltakið og áhugavert kjak og viðmerkingar frá luttakarunum vóru í samband við pallborðsorðaskiftið.

1.9 Ráðstevna um etikk í heilsurøkt í smásamfeløgum

Súsanna Mortensen, námslektari í sjúkrarøktarfrøði á deildini fyri Heilsu- og Sjúkrarøktarvísindi, sum var við í fyrireikingini av ráðstevnuni í Føroyum, heitti á MEGD at hava eina framløgu um sjónarmiðini hjá limafeløgunum við heitinum: "Hvat ynskja fólk ella sjúklingar?"

Ráðstevnan viðgjørdi teir stóru etisku spurningarnar í heilsurøkt, eitt nú, hvørja atgongd skulu vit hava til heilsutænastur, raðfestingar á heilsuøkinum, privatlív og trúnaðarviðurskifti. Eitt annað evnið, sum varð viðgjørt á ráðstevnuni, var stigmatisering í sambandi við heilsurøkt og gransking í smásamfeløgum, og kjakast varð um, hvussu vit kunnu fyrihalda okkum til hesi viðurskifti. Fyilestrahaldarar vóru frá norðurlendsku londunum og Kanada. Tað var The Nordic Committe on Bioethics, NCBio, sum er ein nevnd undir NordForsk og Norðurlandaráðnum, sum skipaði fyri ráðstevnuni í samstarvi við Fróðskaparsetur Føroya.

Framløgan hjá MEGD bygdi á skrivlig svar frá limafeløgunum og eina bólkasamrøðu, har høvuðstættirnir í skrivligu svarunum vóru útdýpaðir. 9. oktober 2019 var formans- og limafundur, har úrslitini frá kanningini vórðu løgd fram. MEGD hevur verið á fundi við Almannaverkið um úrslitini av kanningini.

2 ST- sáttmálin

Í døgunum 2. og 3. apríl var MEGD til hoyring hjá ST-nevndini við støði í frágreiðing við evnislista "List of Issues" , sum vísir á avbjóðingar á brekøkinum. Í frágreiðingini verður víst á, at enn eru avbjóðingar hjá persónum, ið bera brek í Føroyum. Føroyska frágreiðingin er partur av frágreiðing, ið er gjørd saman við limafeløgunum og meginfeløgunum í Danmark og Grønlandi. Avbjóðingar eru m.a. innan heilsu, útbúgving og atkomu. Í frágreiðingini eru spurningar, sum vit vóna, at ST-nevndin fer at spyrja

Føroya Landsstýri og sum Landsstýrið fer at svara. Sí EVNISLISTI TIL ST-NEVNDINA FYRI FØROYAR 2019 á heimsíðuni hjá MEGD[1]:

Íkast úr Føroyum - List of Issues

Civil Society Input to the List of Issues 2019

Listi 2019 av málum á føroyskum

MEGD arbeiðir miðvíst við at minna á niðurstøðurnar úr ST og fyri at ávirka almenna myndugleikan at arbeiða miðvíst við at gera neyðugar broytingar, fyri soleiðis at tryggja, at arbeitt verður út frá sáttmálanum og niðurstøðunum.

MEGD hevur havt regluligt samskifti við Almannamálaráðið viðvíkjandi at seta tilmælini frá ST nevndini í verk í Føroyum. Serliga eru tað tilmælini viðvíkjandi grein 33 í ST sáttmálanum, sum snýr seg um, at limalondini skulu stovna eina ella fleiri miðsavnandi eindir, soleiðis at ásetingarnar í sáttmálanum verða settar í gildi.

Samskipandi eind

MEGD fegnast um, at á vári 2019 varð Samskipandi eindin sett. MEGD hevur verið á fundi við samskipandi eindina og hevði eina framløgu um ST sáttmálan og mál, sum MEGD arbeiðir við. Nýggj fólk skulu manna eindina, og hevur tað drigið út, so hon er ikki rættiliga farin til verka enn. MEGD fegnast um, at tað er niðurfelt í samgonguskjalið, "*at ein yvirskipað brekpolitisk virkisætlan fyri Føroyar skal gerast" (samgonguskjal 2019-2023, s. 13).*

Teksting og teksnmálstulking í KVF

Viðvíkjandi Mentamálaráðnum hevur MEGD samskift um viðurskiftir, ið viðvíkja at teksta sendingar í KVF, ið arbeitt hevur verið við.

MEGD var á fundi við nýggja kringvarpstjóran um "Public service" sáttmálam og atkomu. MEGD fegnast um, at fleiri sendingar verða tekstaðar og teknmálstulkaðar. Tó eiga fleiri sendingar at verða teknmálstulkaðar og tekstaðar. Sambært samgonguskjalinum 2019-2023 skal Teknmálstulking og føroyskur tekstur í sjónvarpinum styrkjast. Ein ætlan um "talu til tekst" fyri sjónveik verður stuðlað.

Hugstoytt var tó, nú Føroya Landsstýri hevur gjørt uppskot til svar til ST, at einki stendur um teknmál, skrivitulk ella teksting. MEGD fegnast um, at Ruth Vang, løgtingskvinna varpaði ljós á teksting í føroyskum sjónvarpssendingum við fyrispurningi til landsstýrismannin Jenis av Rana, sum varðar av mentamálum. Vónandi verður funnin ein loysn á hesum.

MEGD fegnast um, at tíðindafundurin í Tinganesi d. d. 12.03.2020 um støðu Føroya í samband við COVID-19 smittuna, varð teknmálstulkaður og live-bloggaður, soleiðis at hoyriveik fingu beinleiðis frásøgn frá tíðindafundinum.

[1] MEGD: https://megd.fo/st-sattmalin

Skúli og lesi- og skriviveik

MEGD fegnast um, at tað í samgonguskjalinum 2019-2023 er niðurfelt, at vit framhaldandi eiga at stuðla skrivi- og lesiveikum næmingum, soleiðis at teir kunnu nema sær útbúgving á jøvnum støði við onnur. Harafturat, at skúlatilboðini til teir næmingar, sum hava menningartarn og koma úr fólkaskúlanum, verða ment.

Hagtøl
MEGD hevur verið á fundum við Mentamálaráðið um hagtøl (grein 31) t.d., hvussu nógvir næmingar í fólkaskúlanum hava serliga skipað skúlatilboð.

MEGD hevur fingið upplýst frá Mentamálaráðnum, at tað vóru 189 næmingar í fólkaskúlaaldri, sum fingu tilboð út um vanliga fólkaskúlatilboðið á t.d. serstovum og serskipanum. Viðmerkjast skal, at talið byggir á eina støðulýsing, og tølini broytast alla tíðina.

Mannarættindaeind

Í 2017 avhendaði táverandi Uttanríkis og Vinnumálaráðið eitt tilmæli frá einum arbeiðsbólki um, hvussu ein mannarættindaeind ella ráð eigur at verða skipað í Føroyum. Víst varð á fýra møguleikar, har eindin varð knýtt at einum verandi stovni[2]. MEGD hevur víst Almannamálaráðnum og Uttanríkis- og Vinnumálaráðnum á, at Grønland hevur sett eitt talsfólk á økinum. Bjørt Samuelsen, tingkvinna setti 13.02.2019 munnligan fyrispurning til Eyðgunn Samuelsen um talsfólk á Brekøkinum. Eyðgunn Samuelsen svaraði, at hon var í gongd við at seta eina samskipandi eind tvørtur um ráðini, sum fór at gera eina brekpolitiska ætlan, har spurningurin um talsfólk fór at verða tikin við. Forkvinnan hjá MEGD hevur verið alment frammi um, at enn er eingin brekpolitisk ætlan gjørd fyri Føroyar.

Viðvíkjandi grein 33 um óheft eftirlit, ið skal hava eftirlit við, at sáttmálin verður settur í verk á øllum økjum í Føroyum, stendur í samgonguskjalinum 2019-2023, *at talsfólk til borgarar við tørvi vegna brek ella sjúku verður sett í starv í samráð við Megd.* MEGD hevur 18.11.2019 verið á fund við Jenis av Rana, menta- og uttanríkisráðharra fyri at hoyra, hvørjar ætlanir landsstýrið hevur viðvíkjandi grein 33 um óheft eftirlit. Í frágreiðingini til ST í samband við evnislistan 2019, stendur í svarinum frá Føroya Landsstýri, at ein bólkur er settur at gera eitt tilmæli um mannarættindaeind, sum skal avhendast politisku skipanini á vári 2020. Spennandi verður at fáa at vita, hvat tilmæli arbeiðsbólkurin hevur til mannarættindaeind.

Síðan Ráðið fyri brekað varð niðurlagt hevur MEGD verið ógvuliga einsamalt á økinum, og er tað átrokandi at fáa eina skipan, sum hevur eftirlit við, at ST-sáttmálin verður íverksettur.

2.1 Hagtøl og lýsing av brekøkinum

Sambært grein 31 í ST sáttmálanum skulu limalondini átaka sær at savna hóskandi upplýsingar, eisini hagtals- og granskingartilfar, sum ger tey før fyri at orða og seta í gildi reglur, ið seta sáttmálan í verk.

[2] Uttanríkis- og Vinnumálaráðið apríl 2017.
https://d3b1dqw2kzexi.cloudfront.net/media/9642/fr%C3%A1grei%C3%B0ing-og-tilm%C3%A6li-um-mannar%C3%A6ttindaeind-mai-2017.pdf

Í Føroyum mangla vit hagtøl fyri brekøkið. Sum áður umrøtt mangla vit eina demografiska lýsing og tørvslýsing av økinum. Høvdu vit hagtøl, var lættari at fáa eina mynd av støðuni.

Nakað av føroyskum tilfari er. Granskingardepilin fyri økismenning og MEGD (tá MBF) stóðu í 2007 fyri at fáa eina kanning gjørda um livikorini hjá fyritíðarpensjónistum í Føroyum. Tað var ein spurnarkanning, sum Olga Biskopstø og Martha Mýri stóðu fyri. Kanningin varpaði ljós á viðkomandi evnir á brekøkinum.

Í desember 2019 hevði MEGD fund við Olgu Biskopstø, har hon greiddi frá, hvussu kanningin varð gjørd. Eisini tosaðu vit um møguleikan at gera eina líknandi kanning, ið lýsir livikorini hjá fyritíðarpensjónistum í dag, og sum er sambærlig við kanningina frá 2007. Hetta er áhugavert í ljósinum av, at skipanir og veitingar eru broyttar síðani tá. Spurningurin er so, um støðan hjá fyritíðarpensjónistunum síðani er broytt. Tóra og Jónvør vóru á áhugaverdum fundi við Chic Collin, rektara og Jóhan Ísak Hansen, fyrisitingarstjóra á Setrinum 20.02.2020 um samstarv at gera eina nýggja livikorskanning. Setrið arbeiðir víðari við málinum og vendir aftur.

MEGD hevur fingið kunning um aðrar verkætlanir so sum granskingarverkætlan um børn, sum bera brek og familjur teirra í Føroyum og eina aðra granskingarverkætlan um, hvussu rørsla og virkin luttøka gagna útsettum bólkum og hvørjir lutir eru við til at stimbra og varðveita rørslu og virkna luttøku.

2.2 Vitjan í Leirvíkar skúla og Vágs skúla

MEGD var á vitjan í Leirvíkar skúla og Vágs skúla, har børn í 2. flokki vórðu biðin at tekna eina mynd, sum lýsti eitt virkið lív. Eisini fingu børnini bókina Lukka. Myndirnar blivu vístar í Smæruni á altjóða degnum 3. desember. Nakrar av myndunum eru í MEGD blaðnum 2019.

3 Formansfundir

Formansfundur var 15. mai 2019, har **Talgildu Føroyar** (TF) vóru við. Umboð fyri TF greiddu frá loysnunum í talgilda samleikanum og tænastuportalinum, sum skal takast í nýtslu seinni í ár. Á fundinum vórðu umrøddir spurdómar viðvíkjandi nýtslu, atkomu, trygd og vernd av trúnaðarupplýsingum, og hvørji atlit eiga at verða tikin frá myndugleikanar síðu til einstaklingar, sum bera brek.

Formansfundur var 5. februar 2020. **Alarm.fo** hevði ynskt fundin við limafeløgini. Alarm.fo hevur ment eina KT-skipan, ið kann senda kunning umvegis eina app. Ein prototypa er ment og hevur verið royndarkoyrd í 1,5 ár. Ynski við fundinum var at fáa hugskot til næstu fetini. Torben Nielsen umboðandi Alarm.fo hevði eina framløgu um eina møguliga samskiftisskipan, ið kann fáa Føroyar at liva upp til ásetingarnar um kunning í Brek - sáttmálanum. Hann greiddi frá síni hugsjón, ætlanum og royndum at fáa neyðuga kunning lættliga út til øll. Kunningin kann vera í mun til, hvar ein býr ella arbeiðir. Kunningin skal eisini tillagast tørvin hjá tí einstaka, og tað skal ikki taka meira enn "eitt klikk" at fáa yvirlit. Á fundinum var hugsjónin handan samskiftisskipanina umrødd, royndir og læra, hvussu hetta kann gerast tøkniliga, og hvat krevst, fyri at fáa hetta at eydnast. Limafeløgini høvdu viðkomandi spurningar til skipanina og tilmæli um krøv til tað, sum skal til, at boðini koma út til øll. Torben Nielsen tók tilmælini við sær, og avtalaður varð fundur við Deyvafelagið um menning av skipanini til fólk við hoyribreki. Hann arbeiðir víðari við málinum og vendir aftur.

4 Lógararbeiði

MEGD fær nógv lógaruppskot og kunngerðir til hoyringar. MEGD sendir hoyringssvar til øll lógaruppskot, sum koma til felagið, hóast hoyringsfreistin í nógvum førum er stutt.

4.1 Skeið um avleiðingar av lógaruppskotum, Stjórnarskúlin

Guðrun Mortansdóttir Nolsøe frá Løgmansskrivstovuni heitti á Tóru og Jónvør at hava framløgu á skeiði 7. nov. 2019 hjá Stjórnarskúlanum fyri starvsfólk í ráðunum um okkara hugsanir og royndir um lógarsmíð, og um ásetingarnar í ST sáttmálanum verða settar í gildi í føroyskari lóggávu. Umboðandi MEGD fegnast vit um møguleikan at samskifta við ábyrgdarpersónar, sum fyrireika lógaruppskotini. MEGD fegnast eisini um, at vit mangan verða boðin til framløgur av nýggjum lógaruppskotum, har vit fáa frágreiðing um arbeiði við lógaruppskotunum.

5 Rættindi og luttøka

5.1 Teknmáls- og skrivtulkatænastan

Teknmálstulkatænastan (TTT) kom undir Almannaverkið 1. januar i 2019, og deildarleiðari bleiv settur. MEGD fegnast um, at økið verður skipað við deildarleiðslu. Tað , sum er óheppið er, at TTT er avmarkað vegna manglandi starvsfólkatilfeingi, og er tað sera óheppið, at MEGD í fleiri førum ikki hevur fingið teknmáls- og skrivitulk til almenn tiltøk og fundir við limafeløgini. MEGD hevur verið á fund við avvarðandi limafeløg, Teknamálstulkatænastuna og depilstjóran, fyri at umrøða støðuna. MEGD hevur javnan alment og á fundi við ábyrgdarhavandi víst á, at Teknmáls- og skrivitulkatænastan eigur at mennast, fyri at tryggja bæði vaksnum og børnum munagott samskifti og upplýsing. Orsaka av starvsfólkaskifti í TTT hevur als ikki verið møguligt at fingið skrivitulk. MEGD hevur víst á, at málið er átrokandi og ein tilgongd má byrja við tað sama, fyri at fáa fleiri teknmáls- og skrivitulkar, sum verða útbúnir um 3-4 ár. MEGD er kunnað um, at AV er í ferð við at gera lýsingarátøk, fyri at fáa fólk at fara at læra. MEGD hevur væntanir um, at orðingin í Samgonguskjalinum *Deyvatulkingartænastan verður styrkt* (2019-2023, s. 14) verður veruleiki.

MEGD hevur fleiri ferðir víst á, at miðvíst eigur at verða arbeitt við at seta ein samskiftisdepil á stovn. Hetta stendur eisini í evnislistanum, sum MEGD saman við limafeløgunum hevur sent ST. Í løgtinginum 12.02.2020 setti Steffan Klein Poulsen Kaj Leo, heilsumálaráðharra, fyrispurning um ætlanir vóru um uppfylgjandi viðgerð fyri fólk í Føroyum við Cochlear Inplant (CI). Sagt varð, at tað eru 24 persónar í Føroyum, sum hava fingið CI, og tey, sum verða skurðviðgjørd í DK fáa onga viðgerð aftaná. Hetta er eitt álvarsmál, tí uppfylgingin er eins týdningarmikil sum sjálv skurðviðgerðin, um børnini skulu menna hoyrn og talu, soleiðis, at tey kunnu samskifta.

5.2 Bústaðarviðurskiftir

Ein stórur tørvur er framvegis at útvega egnaðar bústaðir til fólk við breki, serliga í Tórshavn. Ætlanin við Reynstúni í 2019 kom ikki veruliga í gongd. Núverandi almannamálaráðharri Elsebeth Mercedes Gunnleygsdóttir hevur alment fört fram, at gongd skal setast á bústaðarbygging til fólk við breki.

MEGD hevur víst á, at ein burðardygg ætlan má gerast fyri bygging av bústøðum til fólk við breki, sum gongur tvørtur um løgtingsval. MEGD vónar, at ferð kemur á bygging av vardum bústøðum, sambýlum, bústovnum til fólk við serligum tørvi samsvarandi Samgonguskjalinum 2019-2023, s. 13.

5.3 Miðnámsútbúgving, serligt skipað miðnám

Skúlatilboðið *Serligt skipað miðnám* hevur givið næmingum við avbjóðingum atgongd til tillagað miðnámskúlatilboð sambært førleikum. Skipanin eigur at útbyggjast í tráð við samgonguskjalið (2019-2023, s. 15), so enn fleiri fáa møguleika at fáa miðnámssprógv, sum mennir tey til sjálvstøðugt lív og arbeiði.

5.4 Norðurlendsk ráðstevna brek og víðari lestur

18. og 19. september vóru seminardagar í Føroyum undir heitinum *Studentmobilitet och funktionshinder i Norden*. Tosað varð um møguleikar og forðingar hjá fólki, ið bera brek, at lesa víðari á hægri lærustovnum heima og í øðrum londum. Á seminarinum fingu lesandi høvi til at siga frá teirra royndum. Hrafnhildur Kristbjörnsdóttir úr Íslandi, Meifríð Weihe Hansen, Andrias Klein Gregoriussen, Áki Joensen og Hanus Samró, lesandi úr Føroyum, lýstu støðuna væl. Í stuttum kann sigast, at fólk, ið bera brek, og sum velja at lesa víðari, møta forðingum í skipanum, ið ikki eru serliga liðiligar.

5.5 Atkoma

MEGD minnir javnan myndugleikar á at tryggja atkomu til fólk við breki. Tað eru enn nógv almenn støð, har atkomumøguleikarnar eru sera avmarkaðir. Útlendingar í rullustóli, sum ætla sær at vitja Føroyar, kontakta stundum MEGD við fyrispurningi um atkomu, og vísa vit til ferðamannastovurnar. Saman við Visit Tórshavn hevur MEGD dagført eitt yvirlit yvir atkomu í Tórshavn til matstovur, hotel, søvn, kirkjur o.a.[3]

5.5.1 Bussarnir atkomuligir

Strandfaraskip Landsins kunnu nú bjóða øllum, sum koyra við Bygdaleiðum komandi sjey árini, eina dygdargóða tænastu við umhvørvis- og brúkaravinarligum bussum, og nú kunnu allir bussarnir frá sáttmálabyrjan 1. mai 2020 taka koyristólar.

5.5.2 Luttøka á arbeiðsmarknaðinum

Føroyar fingu í 2012 Løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk, har lógin fevnir um tiltøk, ið stuðla undir eitt virkið arbeiðslív hjá persónum, sum hava ella kunnu fáa trupulleikar við at varðveita tilknýtið til arbeiðsmarknaðin (§ 1). Lógin fevnir eisini um tiltøk, ið fyribyrgja avleiðingar av langtíðarfráveru frá arbeiði vegna arbeiðsloysi, sjúku el. a. (Stk. 2). Sambært Almannaverkinum eru arbeiðsgevaðarar jaligir at seta fólk við breki í arbeiði og stuðla tí rúmliga arbeiðsmarknaðinum. Tó við tí metlága

[3] Visit Tórshavn, Accessibility: http://visittorshavn.fo/content/uploads/2019/12/atkomaendaligt.pdf

arbeiðsloysinum [4] [5] og við tí høgu ferðini, sum er í samfelagnum í dag, kunnu arbeiðsgevaðarar hava trupult við at bjóða tann eyka innsatsin og tíðina, sum skal til at seta fólk, sum hava brek.

Sambært kunning frá Almannaverkinum verður lógin um arbeiðsfremjandi tiltøk praktiserað eftir hesum leisti, har ein fyrst roynir virknisvenjing. Um tað ikki gevur úrslit, roynir ein arbeiðsbúgving/útbúgving, og um tað heldur ikki gevur úrslit, roynir ein tillagað starv, og um tað ikki gevur úrslit, fer ein á fyritíðarpensjón.



Sambært tølum frá AV (01.01.2020) eru umleið 900 fólk í arbeiðsbúgving og umleið 300 fólk í tillagaðum starvi. 01.07.2019 vóru 1082 fólk á hægstu fyritíðarpensjón, 432 á miðal fyritíðarpensjón og 211 á lægstu fyritíðarpensjón. 349 vóru á vanligari forsorg.

Sambært Samgonguskjalinum 2019-2023 skulu .....*arbeiðstilboð til persónar við skerdum førleikum verða raðfest. Viðvíkjandi arbeiðstilboðum skulu almennir stovnar ganga undan*. MEGD fegnast um økingina av fólki í arbeiðsbúgving og vónandi heldur góða gongdin fram við fleiri arbeiðstilboðum komandi árini.

MEGD vil mæla til, at tað kemur ein lóg í Føroyum, sum áleggur arbeiðsgevarum rímiliga tillaging, soleiðis at fólk við breki fáa útvegað umstøður og hjálpartól, sum tey kunnu vera virkin á arbeiðsmarknaðinum. MEGD hevur víst á, at sambært lóg, sum bannar mismuni á arbeiðsmarknaðinum[6], skulu klagur um mismun stílast til Javnstøðunevndina, sum viðger klagur um mismun millum kvinnur og menn. Ongin klaga er komin til Javnstøðunevndina um mismun vegna brek. MEGD hevur víst á, at ein heldur skal kunna klaga til ein myndugleika, sum hevur við brek at gera.

[4] Hagstova Føroya: https://hagstova.fo/fo/samfelag/arbei%C3%B0i/arbei%C3%B0sloysi

[5] Arbeiðsloysiskipanin: https://als.cdn.fo/media/1214/%C3%A1rsfr%C3%A1grei%C3%B0ing-2018.pdf?s=Khe8ijQmMivohuifoBktl7mrBa4

[6] Løgtingslóg nr. 63. Frá 26. Juni 2011 um at banna mismuni á arbeiðsmarkanaðinum orsaka av breki https://logir.fo/Logtingslog/63-fra-26-06-2011-fra-at-banna-mismuni-a-arbeidsmarknadinum-orsakad-av-breki

5.6 Verja og rætt at atkvøða

Tey, sum eru undir §6 verju, eru ómyndig í øllum viðurskiftum, og hava ikki valrætt. MEGD hevur heitt á myndugleikarnar at broyta lógina, soleiðis at hesi hava rætt at atkvøða. Danska verjulógin bleiv broytt í des. 2018, soleiðis at ávísir borgarar undir §6 verju fingu valrætt, og eiga føroyskir myndugleikar at gera tað sama. Sambært svarskrivi dagfest 13.03.19 frá landstýriskvinnunum í Almanna-, heilsu- og innlendismálum, var tað ivasamt, um ein broyting náddi at koma í gildi áðrenn løgtingsvalið í 2019, av tí freistirnar fyri at lata løgtinginum uppskot til lógarbroytingar vóru farnar. Kunnað varð um, at skrivið frá MEGD var sent løgmanni til kunningar, soleiðis at landsstýrisfólkini saman við løgmanni kunnu finna útav, hvussu farast skal fram. MEGD hevur aftur tann 04.03.2020, nú nýggj fólk manna landsstýrið, vent tær til løgmann, landsstýriskvinnuna í almannamálum og landsstýrismannin í umhvørvis- og vinnumálum við áheitan um, at teir tríggir myndugleikarnir, sum varða av málinum, saman finna eina loysn, hvussu farast skal at.

5.7 Verkfall

Tá verkfall var í 2018 var støðan á brekøkinum alt annað enn góð. Fólk vóru noydd at flyta úr egnum heimi, orkan á stovnunum, ið hóast íkomnu støðuna enn vóru virknir, var rættiliga skerd, borgarar mistu stuðulin heima og rættin til náttarvakt, og verkfallið/verkbannið rakti børn, ið bera brek í fólkaskúlanum. Borgarar hava vent sær til MEGD við stúran um komandi lønarsamráðingar.

MEGD vendi sær í juni 2019 til Kristinu Háfoss, landsstýriskvinnu, Anniku Olsen, forkvinnu í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum og Jógvan Philbrow, formann í Føroya Pedagogfelag við áheitan um at gera avtalur og taka stig til, at sama støðu, sum hendi undir verkfallinum í 2018, ikki aftur gerst veruleiki til sáttmálasamráðingarnar 2020. MEGD hevur verið á fundi við Pædagogfelagið, Jørgen Niclasen og biðið um fund við Helga Abrahamsen, landsstýrismann fyri arbeiðsmarknaðarmál.

Løgtingsfólk viðgjørdu fyrispurning hjá Brandi Sandoy til landsstýriskvinnuna í almannamálum á tingi 12.02.2020 um málið, og hugaligt var at hoyra, at semja var um, at her má okkurt henda.

MEGD hevur væntanir um, at orðingin í samgonguskjalinum (2019-2023 s. 13) verður veruleiki: *Avtala verður gjørd millum Almannamálaráðið og avvarðandi yrkisfelag um verju í sambandi við møguligt verkfall.*

5.8 Fyritíðarpensjón og gjald fyri heimahjálp

MEGD var gjørt vart við, at gjald fyri heimahjálp er kostnaðarmikið hjá fyritíðarpensjónistum, tí gjaldið er grundað á samlaðu inntøkuna hjá hjúnunum. MEGD hevur heitt á myndugleikarnar at bøta hesi viðurskifti soleiðis, at mótrokning millum hjún verður strikað, og at inntøkuloftið verður hækkað. MEGD fylgir málinum upp. Í samgonguskjalinum stendur, at egingjald fyri heimahjálp skal endurskoðast (Samgonguskjal 2019-2023, s. 12).

5.9 Trygging

MEGD fekk fyrispurning, um føroysku tryggingarfeløgini veita eins góða trygging til fólk við breki sum t.d. HGF tryggingin[7] í DK. MEGD spurdi seg fyri og var á fundi við TRYGD og Betritrygging, fyri at hoyra, hvørjar tryggingar eru galdandi í Føroyum.

Niðurstøðan var, at føroysku tryggingarfeløgini veita líknandi vanlukku/skaðatryggingar og dekning sum HGF tryggingin.

5.10 Framtíðarfullmakt

MEGD hevur 04.03.2020 sent áheitan til AMR, landsstýriskvinnuna í almannamálum, um at fáa fyriskipanina við framtíðar fullmakt setta í verk í Føroyum. Í Danmark ber til at stovna framtíðar fullmakt, har ein sjálvur kann velja, hvør skal umboða ein, um ein ikki longur kann røkja síni fíggjarligu ella persónligu áhugamál orsaka av sjúku, viknaðum andsevnum ella líknandi[8].

6 Ymiskt

Norðurlendskt samstarv

HNR Handikapporganisasjonenes Nordiske Råd

Ísland hevur formansskapin í HNR (Handikaporganisationernes Nordiske Råd) 2019-2021. Tey, ið sita sum umboð fyri tey Norðurlendsku meginfeløgini eru formenn/kvinnur og aðalskrivarar í meginfeløgunum. Tóra og Jónvør hava verið á fundi í Íslandi í mars og í Svøríki í oktober 2019. Arbeitt verður við eini rapport at lýsa arbeiðsmarknaðin fyri persónar við breki í teimum norðurlendsku londunum.

Rådet för Nordiskt samarbejde hevur verið virkið síðan 2013. Tóra við Keldu, forkvinna umboðar MEGD í ráðnum, og Jónvør Christiansen, aðalskrivari er tiltakslimur í ráðnum. Tóra var á fundi í ráðnum í Íslandi í mars og í oktober í Svøríki í 2019.

Umboðan í Ráðum og nevndum í Føroyum

Dugni

Ása Olsen, fyrrverandi aðalskrivari, umboðar MEGD og er forkvinna í ráðnum fyri Dugna.

---

[7] https://hgf.dk/hovedside/

[8] Keldur: Lov om fuldtidsfuldmagter: https://www.retsinformation.dk/Forms/R0710.aspx?id=180174
Familieretshuset: https://familieretshuset.dk/fremtidsfuldmagt/fremtidsfuldmagt
Alzheimerforeningen. Dk https://www.alzheimer.dk/nyheder/2017/fremtidsfuldmagten-traeder-i-kraft-1september/

Ráðið fyri ferðslutrygd
Herit Joensen, Vestmanna hevur sitið sum umboð fyri MEGD í ráðnum í nógv ár, men hevur valt at taka seg úr ráðnum. MEGD takkar henni fyri tíðina.

Serflutningsskipanin
Ása Olsen, fyrrverandi aðalskrivari í MEGD, situr sum umboð fyri MEGD og er skrivari í stýrinum fyri Serflutningsskipanina. MEGD er gjørt vart við, at onkur kommuna hevur sagt sáttmálan viðvíkjandi serflutningi hjá fólki 18-67 ár upp, og at eingin skipaður serflutningur varð settur ístaðin. MEGD vendi sær til til Almannamálaráðið og fekk at vita, at einki virksemi er í stýrinum fyri Serflutningstænastuna, og at bíðað verður eftir Vælferðarlógini. MEGD vendi sær til Almannaverkið um, hvussu serflutningur verður skipaður í teimum kommunum, sum hava uppsagt avtaluna um serflutningin fyri tey 18-67, har svarið var, at arbeitt verður við at finna eina loysn.

Psykiatriska sjúklingakærunevndin
Fyri MEGD situr Sámal Lindenskov, sálarsjúkrarøktari og dagligur leiðari á sambýlinum í Eysturstræti.

Á Grækarismessu 12/03/2020/Jónvør Christiansen, aðalskrivari